*Samráðingar í London:*

# Neyvan úrslit av fundinum

*Samráðingarnar um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland*

Seinnapartin í morgin byrjar samráðingarnar í London við bretar um markið á undirgrundini millum Føroyar og Bretland.

- Okkara vón er at koma nakað ávegis í samráðingunum, men støðan er ikki búgvin til at koma til nakað úrslit enn, sigur Árni Olafsson, formaður í føroysku-donsku samráðingarnevndini.

Samráðingarnar verða í morgin og hósdagin. Hetta verður fyrsti fundurin, síðan føroyingar yvirtóku leiðsluna av samráðingunum, og fyrsti fundurin síðan oktober í fjør.

Undan fundinum heldur Árni Olafsson tað vera ilt at siga, hvat kann koma burturúr, og hvussu samráðingarnar fara at ganga. Samráðingarnar verða neyvan léttari av, at tað nú er meira sannlíkt, at olja finst í føroysku undirgrundini, tí nú fara báðir partar ivaleyst at halda fast um hvønn fermetur, heldur Árni Olafsson.

Teir ætla, at fundirnir í framtíðini skulu verða við styttri millumbilum. Hin ferð gekk eitt hálv ár, og nu eitt ár. Nær næsti fundur verður, er ikki ásett. Tað veldst eisini um, hvussu fundurin hesu ferð verður, sigur Árni Olafsson.

**randi**



*Árni Olafsson sleppur nu at royna seg sum samráðingarleiðari*

Verður sent ópostað

Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 3238
FR-110 Tórshavn

*Bygdarhúsið á Strondum:*

# Almennur fundur um flakavirkini

Hoskvøldið kl. 20 skipar Bygdarhúsið á Strondum fyri almennum upplýsingarfundi og kjakfundi, og evnið verður serliga óvissa framtíðin hjá flakavirkjunum.

Fleiri virki laat nú í fyrstu atløgu aftur, og so koma allir spurningarnir, hvat hesi viki kunnu brúkast til, hvørjir møguleikar verða, hvussu verður at fáa fígging til nakað o. s. v. Og hvussu verður í øllum teimum førunum, har kommunan eigur økið, sum virkið stendur á - fer kommunan kanska at kunna ogna sær virkið biliga?

Tað mesta av flotanum fer gjøgnum tvingsilssølu, og so er tað sjónarmiðið, at bankarnir og Fiskavirking stýra øllum tí eisini.

Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum leggur fundin til rættis, sigur, at roynt verður at fáa upplýst til fundin, hvørji virki sleppa at halda fram.

Við á fundinum verða Bjarti Mohr, stjóri í Fiskavirking, Olaf Olsen, vinnulívsmaður, Harald Eirikstoft, fyrrverandi flakavirkisstjóri á Strondum, Árni Dam, skipaeigari, og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur.

Jógvan Óli á Fríðriksmørk leggur dent á, at fundurin ikki bara snýr seg um støðuna á Strondum, men um alla vinnuna í landinum.

**randi**

# Oluffa formaður

Føroya Prentarafelag hevur fingið nýggjan formann. Hon eitur Oluffa Joensen og arbeiðir á Estra í Gøtu

Felagið hevði árliga aðalfund sín leygardagin. Petur Debes, sum hevur verið formaður seinastu fimm árini, bar seg undan afturvali, og Oluffa Joensen tók so formansstarvið á seg. Oluffa var frammanundan kassameistari í felagnum.

Nevndin í Føroya Prentarafelag er nú henda: Oluffa Joensen, formaður, Tummas Pauli Thomsen, kassameistari, og Tróndur Nybo, skrivari. Tiltakslimir eru Torkil Johannesen og Eyðun Miðberg.

Limatalið í Føroya Prentarafelag er umleið 50.

**randi**

## VALUTAKURSIR

| | | 4.10.93 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollari | 663,65 | 654,10 |
| Bretland | Pund | 997,86 | 987,36 |
| Týskland | Markur | 405,65 | 404,21 |
| Svøríki | Króna | 81,51 | 81,35 |
| Noreg | Króna | 92,79 | 92,56 |
| Frakland | Frankur | 116,33 | 115,87 |
| Belgia | Frankur | 18,746 | 18,731 |
| Sveits | Frankur | 465,07 | 461,77 |
| Holland | Gyllin | 361,17 | 359,87 |
| Italia | Lírí | 0,4158 | 0,4136 |
| Finnland | Markur | 113,06 | 113,36 |
| Ísland | Króna | 9,51 | 9,44 |
| Eysturríki | Skillingur | 57,654 | 57,448 |
| Spania | Pesetas | 5,030 | 5,007 |
| Portugal | Escudos | 3,941 | 3,927 |
| Kanada | Dollari | 496,82 | 491,25 |
| Japan | Yen | 6,2662 | 6,2159 |
| Írland | Pund | 950,69 | 944,59 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,813 | 2,799 |

Kelda Føroya Sparikassi